

## Krevja konvojverju móti sjórænarum

Sjórænarahóttanin móti reiðaríinum er nú vorðin so umfatandi, at tey nú krevja hernaðarliga konvojverju, tá tey sigla gjøgnum týdningarmiklu Aden-víkina. Áheitanin frá reiðaríunum er send Fólkatinginum. Trupulleikarnir við sjórænaraálopunum við Somalia eru eskaleraðir seinastu vikurnar. Fyri 11 døgum síðani fingu sjórænararnir størsta fongin higartil, tá teir kapraðu fult lastaða supertankaran, Sirius Star. Síðani hava eitt nú Maersk Tankers gjørt av ikki at nýta Aden-víkina, og harvið stuttu leiðina gjøgnum Suez-kanalina. Ein røð av hernaðarskipum, millum onnur danska Absalon, patruljera út fyri Somalia, men standa seg ikki serliga væl mótvegis effektivu og vælvápnaðu sjórænarunum, skrivar borsen.dk

# LÍV tryggjar lív í Klaksvíkar kommunu

**Allir peningastovnarnir, sum kommunan søkti um lán, sýttu fyri at læna Klaksvíkar kommunu neyðugan pening, men nú hevur LÍV tryggjað, at kommunan kann røkja sínar fíggjarligu skyldur**

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár undirskrivaðu Tummas Eliasen, stjóri í LÍV og Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, eina avtalu, har LÍV veitir kommununi eitt lán á 20 miljónir krónur.

Afturgjaldingin fer fram yvir 15 ár, har tey fyrstu trý árini eru avdráttarfrí.

Avtalan merkir, at Klaksvíkar kommuna kann svara sínar fíggjarligu skyldur og rinda ógoldnar rokningar og rokningar, sum skulu gjaldast í nærmastu framtíð. Harumframt hevur kommunan nú nakað av eykapeningi at standa ímóti við.

Hetta er greitt, nú láni-avtalan millum Klaksvíkar kommunu og LÍV endaliga er komin upp á pláss.

### Tekir bankar

Tað er rúm tíð, síðan fíggjarnevndin hjá Klaksvíkar kommunu samtykti at heimila einari lántøku á 20 miljónir krónur, men sum flestum kunnugt hevur gingið striltið at fingið hesa fígging til vega frá peningastovnunum, sum allir sýttu fyri at læna kommununi hesar miljónirnar.

Nú eru so viðurskiftini hjá Klaksvíkar kommunu komin upp á pláss við láni-avtaluni – og við hesi loysn kann næststørsta kommunan í landinum nú aftur røkja allar sínar fíggjarligu skyldur.

- Lánið hjálpir okkum úr neyðini og tryggjar kommununi eitt neyðugt andarhol, sigur borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen.



*Fíggjartørvurin og likviditeturin hjá Klaksvíkar kommunu er nú tryggjaður, og kommunan hevur fingið eitt*



# Sera fegin um

**Borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Steinbjørn O. Jacobsen, er sera fegin um lániavtaluna, sum tað hevur eydnast kommununi at fáa í lag við LÍV. – Eg misti ongantíð vónina um, at hetta fór at eydnast, sigur hann**

*- Høvdu vit havt loyst likviditetsspurningin fyri kommunuvalið, hevði støðan helst verið ein heilt onnur – ikki minst fyri meg persónliga, sigur borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu*

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Eg eri ógvuliga fegin um hesa loysnina, sum merkir, at vit nú - umframt at klára okkara skyldur – eisini hava fingið stabilan likviditet.

Tað segði Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, tá vit hittu hann eftir undirskrivingina av avtaluni.

- Eg havi alla tíðina sagt, at vit høvdu aðrar alternativar møguleikar at fáa henda peningin til vega. Vit gjørdu tó av fyrst at royna bankar og sparikassa, men allir sýttu. Og tó – so misti eg ongantíð trúnna á, at okkum fór at eydnast at fáa fíggjarligu viðurskiftini og likviditetin hjá kommununi upp á pláss.

### Gekk skjótt

Steinbjørn sigur, at kommunan vendi sær til LÍV týsdagin í seinastu viku, og longu fríggjadagin svaraði LÍV, at tey vildu læna kommununi tær 20 miljónir krónurnar.

Borgarstjórin sigur, at kommunan ongantíð søkti Suðuroyar Sparikassa um lán, tí kommunan metti, at 20 miljónir krónur er nógv-